gult14 cyan14 magenta14 svart14



Tað fer nú at koma sjúklingunum til góða, heldur Ina Frisdahl.

Leiðarin á Sjúklingahotellinum Tórshavn vísir á, at felagsnevnarin hjá so at siga øllum, sum búgva á hotellinum, er sjúka. Tey, sum eru sjúk, og tey, sum standa sjúkum fólki nær, tosa um felags viðurskiftir. Tað skal sjálvandi til, men tá viðurskiftini eru soleiðis, er tað ikki minni týdningarmikið, at onnur tiltøk eru á skránni:

– Áðrenn flytingina av hotellinum vóru bara tríggjar sjúkrasystrar knýttar at hotellinum. Nú hava vit fingið møguleikar fyri at hava sjey sjúkrasystrar í starvi. Allar eru ikki fulla tíð, men sjúkrasystir er á hotellinum allar tíðir á døgninum. Størsta uppgávan hjá okkum er at tosa við sjúklingarnar og tey avvarðandi. Vit vilja fegin skipa fyri tiltøkum, sum viðhvørt kunnu draga hugsanirnar aðrar vegir. Vit skipa eina ferð um mánaðin fyri bingo, sum akkurát hvílir í sær sjálvum, og tað er væl umtókt. Vit hava havt vitjanir av t. d. húsakórinum og øðrum føroyskum virksemi í Keypmannahavn, men vit kundu hugsað okkum, at tað varð gjørt uppaftur meiri við hetta her.



*Hugnaligt er inni*

Tað er í hesum sambandi, at 25 ára føðingardagsynskið kemur fram:

– Vit hava ein bil, men tað hevði verið sera kærkomið, um vit høvdu fingið ein buss, sum rúmar væl fleiri fólkum enn ein bilur. Hetta hevði havt við sær, at tað hevði verið nógv lættari at vitja t. d. í Føroyahúsinum, Samuelskirkjuni ella Kristnastovu, og at tað hevði borið til at skipa fyri útferðum. Vit hava eina kenslu av, at føroyingar í Keypmannahavn høvdu einki havt ímóti at verið við til at skipa fyri sovornum ferðum og tiltøkum, men okkum tørvar bussin, staðfestir Ina Frisdahl.

Tey á hotellinum arbeiða eisini á øðrum økjum við at hækka góðskustøðið:

– Internetsambandið er alneyðugt. Vit hava ein trupulleika, tí tað er torført at samskifta við Føroyar, tá tú ikki hevur fastsamband. Um tveir mánaðir verður trupulleikin loystur. Tá fer at bera til at hoyra útvarpið allan dagin, og tað fer at bera til at arbeiða við internetinum av hotellinum.

Tíðindablaðið Sosialurin ynskir Hotel Tórshavn hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum.

# 1. mai 2001

Støðuleysu stálfuglar higar leita
í margtyriligum tali
skoða svá fjølbroytta skara
grammleika úr sær spýr
eins og vesturheimsins dýr
avstað aftur fara
ei falla á vali
spekulantunum mettuna veita

ríkmenni stálfuglin heiðra
kúgaðu leinkjað standa
marglætistrogið á tremur
lokkandi, dragandi stendur
krúpandi, sjálvtýnandi hendur
profitturin níðingsverk fremur
imperialismuni gongur til handa
sálleysu ríkmenni meira og meira

barnahendur stálfuglin fylla ræðsla úr eygum lýsir
bløðandi hendur valdsharrum lýða
myrkar, hungrandi nætur
eirindaleysu ríkmenni geva ei gætur
kúgandi krefturnar eitrandi víða
óhumsku sprænа ei fagurleika hýsir
ómettandi vesturheimsins ágirndin villa

á verksmiðjum í neyðini grátandi standa
í ruskdungum – úttjørgað liggja
tey tigandi, fjálturstungin í avkrókum sita
ei turrgeldu maktgreðingar tey síggja
innar í glæstriborgir flýggja
rópini tagnað – ongin hjálp til handa
at ósolidariska skaranum hyggja
solidariski verndarroðin, bjargingin, tey vita

hugsjónarfremjandi krefturnar slóða
rættvísisvegin – við allogandi brandi
alheims solidariteturin sterki
humanisma í valdsharraheysum sum sótt
teirra ríki av socialistum verður hótt
socialisman stríðsfús vil sýna í verki
fyri kúgaðu stættini stríðast javnrættarandi
samhaldsfesti vil tey útpíndu samansjóða

stálfuglar á ferð yvir høv og lond
spekulantanna tempul-ránsmannaleið
løn teirra kúgaðu, fátøku áspýtt og háað
høgrarákið listilærdar skortarnar ber
líkasæluna dregur á eitrandi ferð
samvitskuna reina í kapitalismuni tváað
tá oyðandi einaræðisleiðin er greið
kúgaða fjøldin – leinkjað í trælabond

stríðsfús til verka fara
fólkaheimið í havsbrúnni skoða
javnrætt, rættvísi, frælsi í nánd
solidariska stríðsmerkið fríða
fakfelagsvápnini geisla so víða
vil verja tey tigandi víða um lond
rættvísiskyndil sjá brakandi loga
skoðandi alheims socialistiska skaran.

**Sólmundur Joensen**

# Næraberg botnaði á vágni

**Stóri svartkjaftatrolarin stóð fastur á vágni í Klaksvík fyrrapartin í gjár, men móti middegi slapp hann leysur aftur**

ÓHAPP
Eyðun Klakstein

**Klaksvík:** Fyrrapartin í gjár lá Næraberg hjálparleysur nakrar metrar frá bryggju í Klaksvík.

Hann hevði siglt seg fastan á vágni, tá hann skuldi leggja til kai við Northern Fish Cold Storage, har veiðan skal leggjast upp.

Tað er dýpt fram við bryggjuni á vestaru síðu, men Næraberg var ov langt úti á vágni, og tí kom hann at standa fastur. Tað var fjøra fyrrapartin í gjár, og tað gjørdi ikki støðuna betur.

Fram móti middegi eydnaðist tað at fáa Næraberg leysan, so hann kundi leggja til kei. Trolarin hevur 780 tons av surimi og góð 300 tons av mjøli. Ætlanin er, at Næraberg skal avstað aftur seinni í vikuni.



*Næraberg sigldi seg fastan á vágni í Klaksvík mánamorgunin. Tað tók nakrar tímar, áðrenn hann var leysur aftur og slapp seinastu metrarnar til kai.*

*Mynd: SJH*

# Urmakari í 50 ár

**Í dag eru liðin 50 ár, síðani Leivur Ellingsgaard fór undir urmakaravirki í Klaksvík**

URMAKARI
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Hann hevur selt og umvælt brillur, ur og klokkur fyri fólk í 50 ár, og hann er framvegis til arbeiðis í handlinum, sum hann byrjaði í 1951.

Leivur Ellingsgaard er væl kent navn í Klaksvík, og í dag hevur hann móttøku í Skálanum í sambandi við 50 ára dagin.

– Eg ætli mær at arbeiða minni nú, men eg kann lata upp fyri tey um morgnarnar. Ein handil, sum ikki hevur latið upp klokkan 9, kann akkurát tað sama stongja, sigur Leivur Ellingsgaard, sum dámar væl at fara tíðliga til arbeiðis.



*Leivur Ellingsgaard hevur havt urmakarvirki í Klaksvík í 50 ár*

Sum 14 ára gamal fór Leivur í læru hjá Niels L. Arge í Havn, og í 1948 fór hann niður á urmakaraskúla.

Í 1951 fór hann undir sítt egnað virkið í Klaksvík, og hetta virkið hevur hann havt øll árini síðani. Nú hava børnini hjá honum – Randi og Finn – tikið meiri við, og ein abbadóttir er eisini í læru sum optikaLeivur Ellingsgaard hevur móttøku í Skálanum frá klokkan 17.00 til 19.00, og í dagens andledning verður handilin stongdur klokkan 16.00.

gult15 cyan15 magenta15 svart15

ítróttur

Nr. 82 • týsdagur • 1. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Svimjing

TÍÐINDASKRIV

Svimjisamband Føroya hevur í dag gjørt avtalu við Petur Heðin á Fløtti um uppgávuna sum landsliðsvenjara komandi árini.

Umframt landsliði er eisini ætlanin at taka uppaftur, meiri miðvíst arbeiði við ungdómsliðnum.

Fyrsta ítøkiliga uppgávan hjá nýggja landsliðsvenjaranum verður tó landsliði sum skal til oyggjaleikir á Isle of Man fyrst í juli.

Petur Heðin á Fløtti er kendur í føroyskari svimjing, bæði sum svimjari og eisini sum formaður í SSF eitt tíðarskeið. Hann hevur seinastu árini verið uttanlanda í útbúgvingarørindum.

Jesper Ottosen sum hevur verið landsliðsvenjari hjá føroyska landsliðnum síðani september 2000 er givin sum landsliðsvenjari.

# Landsdysturin ímóti Noregi hongur nú í klønum tráði

**Norðmenn vilja hava dystin spældan í november, men tað siga teir í FSF seg ikki vita nakað um**

ALTJÓÐA FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Hóast tað bara er eitt stórt hálvt ár, inntil tað eftir ætlanini verður settur sjøtul á eina nýggja NM landskapping, so hongur ein av dystunum í kappingini, sum tað varð farið undir í januar í fjør, í leysum lofti.

Føroyar og Noreg skulu spæla í Noregi, men tað tykist vera trupult at finna ein dag, sum passar bæði føroyingum og norðmonnum.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum, sigur, at teir hava skotið fleiri dagar upp fyri norðmonnum, men at tað framvegis er ógreitt, nær dysturin verður spældur.

– Vit ætlaðu, at dysturin skuldi spælast um somu tíð, sum okkara lið í januar var í Svøríki, men tá søgdu norðmenn, at tað ikki lá fyri hjá teimum. Síðani hava vit strongt á at fáa dystin spældan í vár, men higartil hevur einki spurst burturúr, sigur Ísak Mikladal.

Svein Rusta er tann í norska fótbóltssambandinum, sum hevur ábyrgdina av fyrisitingini av øllum toppfótbóltinum. Hann váttar, at tað hevur verið torført at fáa dystin ímóti Føroyum spældan.

– Tá føroyingar í januar vóru í Svøríki, var okkara landslið í Hong Kong. Vit vóna, at tað fer at bera til at spæla landsdystin eftir at landskappingin hjá okkum er liløug. Tað vil siga, at tað verður í oktober ella í november. 10. og 14. november eru dagar, sum eru settir av til landsdystir, so tað er ein møguleiki, sum vit fara at skjóta upp fyri føroyingum, sigur Svein Rusta.



*Aðalskrivarin í FSF, Ísak Mikladal, sigur NM-kappingina vera treytaða av, hvussu nógv hini londini leggja í kappingina*

– Vit hava ikki hoyrt tað fyrrenn nú, tit siga tað, at norðmenn ætla, at dysturin skal spælast seint í heyst. Hvussu tað fer at liggja fyri hjá okkara monnum, dugi eg ikki at svara fyri akkurát nú. Hetta er nakað, sum vit mugu tosa við m. a. spælararnar um. Men tað er einki at dylja yvir, at vit høvdu viljað havt dystin spældan fyrri enn so, staðfestir Ísak Mikladal.

## Leisturin ikki tann rætti

Svein Rusta í norska fótbóltssambandinum sigur seg skilja, at tað í tosi ímillum formenn og aðalskrivarar í norðurlendsku fótbóltssambondunum hevur verið semja um, at tað skal haldast fram við NM kappingini. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað skal farast undir eina nýggja kapping eftir ársskiftið:

– Landsliðsvenjarin hjá okkum, Niels Johan Simb, hevur givið til kennar, at honum hevði dámt best, um tað hevði borið til at fingið alla NM kappingina frá hondini í La Manga. Hansara hugsan er, at um landsliðini vóru í La Manga í t. d. tíggju dagar, og um londini vórðu býtt sundur í tveir bólkar, so hevði tað borið til, at øll liðini spældu tveir dystir og síðani ein um endaligu plaseringarnar.

Ísak Mikladal sigur seg ikki hava hoyrt um hetta ynskið hjá norðmonnum, og hann sigur hetta ikki vera í samsvari við tað, sum føroyingar og íslendingar hava ynskst at fáa burturúr NM kappingini:

– Hjá okkum og serliga íslendingum vísir tað seg torført at fáa vinardystir ímóti londum, sum eru hóskandi. Tí hava vit sæð NM kappingina sum ein góðan møguleika fyri avbjóðingum í vinardystum. Vit høvdu fegnir vilja, at allir dystirnir vóru avgreiddir á sama hátt, sum tá ið danska landsliðið við Morten Olsen og Michael Laudrup á odda vitjaði okkum í august í fjør. Tað var ein stór ótróttarlig avbjóðing hjá okkum, og tað kom væl við fíggjarliga, at áhugin ímillum áskoðararnar var stórur, sigur Ísak Mikladal.

Aðalskrivarin í FSF vísir á, at virðið í NM kappingini í La Manga er treytað av, hvat fyri manning hini londini senda til Spania:

– Tað er í besta lagið eitt ligalandslið, men gongdin tykist vera, at støðið ikki er tað, sum kundi verið ynskt.

## Valdu Bulgaria

Í síðstu viku vóru nógvir landsdystir spældir. Onkrir vóru í HM undankappingini, og onkrir vóru vinardystir. Norðmenn høvdu møguleikan at spæla vinardyst á heimavølli ímóti føroyinum, men teir valdu í staðin at spæla ímóti Bulgaria.

Tað hevur gingist illa hjá Noregi í HM undankappingini. Mikukvøldið vunnu teir 2–1 ímóti Bulgaria.

– Tað hevur gingið illa, men vit eru framvegis í góðum lagi. Avrikið ímóti Bulgaria var gott, tá sæð verðurburtur frá fyrstu løtuna, tá verjan var vánalig og Bulgaria skoraði til 1–0, sigur Svein Rusta. Á liðnum hjá Noregi vóru tríggir ella fýra spælarar úr norsku kappingini, meðan allir hinir norðmenninir spæla í útlandinum.

Hvussu rokna tit við, at landsliðið verður mannað, tá tit skulu spæla ímóti Føroyum í heyst?

– Eg gangi út frá, at talan verður um eitt ligalandslið, sigur Svein Rusta.

# FSF skal hava meiri fólk

**Fótbóltssambandið fer at økja um umsitingina, tá teir fyrsta dagin fara at seta ein vara aðalskrivara**

Fótbóltssambandið skal hava fleiri fólk á skrivstovuna. Umsitingin er stór, og tí hevur nevndin gjørt av at lýsa eftir einum fólki afturat. Í lýsingini stendur, at FSF skal hava ein varamann hjá aðalskrivaranum.

Freistin at søkja er farin, men enn er eingin varamaður hjá aðalskrivaranum settur:

– Nevndin viðgjørdi málið á fundi fríggjadagin í síðstu viku. Har varð samtykt, at formaðurin skal seta starvið, eftir at aðalskrivarin hevur gjørt sína innstilling. Tað eru onkur innanhýsis viðurskifti, sum skulu avgreiðast, áðrenn arbeiðið at innstilla og seinni at seta starvið verður gjørt.

Ísak Mikladal vil ikki siga, hvussu nógvir umsøkjarar eru til nýggja starvið, men hann váttar, at tað tykist vera ikki so lítil áhugi fyri tí:

– Tað eru fleiri umsøkjarar, enn tað kunnu teljast á aðrari hondini, og eftir míni meting eru tað fleiri, sum eru skikkaðir til starvið, er tað sum Ísak Mikladal vil siga. Men hann roknar við, at tað ikki fara at ganga fleiri vikur, áðrenn hann hevur meiri at siga um hetta málið.

**jh**